## Garva skinn á Stóru Dímun

Á Stóra Dímun eru tey nú farin í holt við at garva skinn, eins og tey hava gjørt undanfarin ár. Nakað nýtt er, at tey so smátt hava tikið nýggja bygningin í nýtslu. Ein part av loftinum hava tey innrættað til at turka skinnini, skrivar Sandoyarportalurin. Ætlanin er at savna øll garvitólini í nýggja vinnubygninginum. Hin helmingurin av bygninginum skal nýtast til slátur. - Nú vit aftur hava stóra skinngoymslu, hava vit eisini lagt eitt breitt úrval av skinnum á søluteigin á heimasíðuna hjá oynni, www.storadimun.fo.



## Íløgur fyri 9,9 mió í Sørvági

Bygdaráðið í Sørvági hevur samtykt fíggjarætlanina fyri 2010. Av hesi sæst, at tey í ár ætla at gera íløgur fyri slakar 10 mió krónur, harav íløgan í nýggja musikkskúlan fer við sløkum tirðingi av íløgunum, góðar 3,1 mió krónur. Byggibúningin fer í ár at kosta 2,6 mió, meðan tey fara at fríða í kommununi fyri 1,1 mió krónur.

# Tí skar hann oyrað av sær

**Ein listfrøðingur heldur, at hann nú hevur gitt gátuna um, hví Vincent van Gogh skar annað oyrað av sær**

MYNDLIST
*Snorri Brend*

Í grein í danska blaðnum Jyllandsposten verður greitt frá teori'unum hjá listfrøðinginum Tim Bailey um kenda hollendska málarin.

Bailey vísir fyrst og fremst til listarverkið "Skrivibord við leyki" frá 1889, sum van Gogh málaði ein mánað eftir at hann skar oyrað av sær.

Tað sermerkta á myndini er, sambært Bailey brævið sum liggur á borðinum. Hann hevur seranágreiniliga og í smálutum granskað myndina og poststemplini á brævbjálvanum.

Og út frá hesum er hann komin fram til, at brævið er skrivað av bróður hansara, Theo van Gogh, sum júst varð vorðin trúlovaður.

Vincent van Gogh, sum var fíggjarliga og mentalt bundin av bróðuri sínum, gjørdist so uppøstur av tíðindunum, at hann sama kvøldið valdi at skaða seg sjálvan.

Nógvar teori'ir eru annars settar fram um avskornað oyra hjá van Gogh. Ein av teimum seinastu er tann hjá týskum granskarum, sum halda at tað var listarligi starvsfelagi hansara, Gauguin sum var hann sum í roynd og veru skar oyrað av.

Ein onnur teori sigur, at van Gogh í einum epilepsiherðindi skar seg so illa, meðan hann rakaði sær, at hann dagin eftir avgjørdi av skera alt oyrað av sær.



*Brævið, sum liggur høgrumegin á skrivaraborðinum, sigur søguna um at bróður Vincent van Gogh hevði trúlovað seg*



*Kendi listamálarin Vincent van Gogh var bundin av bróðuri sínum*

# Tryggari ferðsla gjøgnum bygdirnar




**Undir Gøtueiði/Runavík: Eitt av endamálunum við arbeiðinum í Runavíkar kommunu er at gera sítt til, at talið av ferðsluóhappum gerst so lítið sum gjørligt.**

Í november skrivaðu kommunan og Landsverk undir avtalu um eina sonevnda ferðslutrygdarætlan fyri vegastrekkið Undir Gøtueiði og út til Mýraveg í Runavík. Hetta er eitt vegastrekki við rættiliga nógvari ferðslu.

Henda ætlanin fyri ferðslutrygdina skal vera liðug 1. apríl í ár. Ein almennur fundur hevur verið um hetta málið, og verður ein aftrat í mars mánaði.

**sb.**